# Kubanar at seta krøv

## FAKTA KUBA

- Christofer Columbus fann Kuba í 1492.
- Sosialistiskt lýðveldi síðani 1959
- Fólkatal: 11,45 milliónir (í juli 2009)
- Fidel Castro tók valdið í Kuba í 1959, og meiri enn 100.000 kubanar flýddu til Florida. Kuba gjørdi fleiri handilsavtalur við Sovjetsamveldið, og grundlógin, sum er frá 1976, er gjørd eftir sovjetskum leisti.
- Tann sonevnda Kuba-kreppan kom í 1962, tá amerikanarar varnaðust, at Kuba var í ferð við at seta upp sovjetskar rakettir við kjarnorkuløðingum. Sovjetska stigið var ein roynd at svara amerikonsku avgerðini at seta upp tilsvarandi rakettir í millum annað Turkalandi.
- Kuba-kreppan kundi endað sum eitt kjarnorkukríggj, men spenningurin legði seg, tá Sovjetsamveldið gekk við til at taka rakettirnar aftur undir ST-eftirliti. Samstundis bant USA seg til ikki at leypa á Kuba. Avtalan er framvegis í gildi.



*Leiðarin í teirri katólsku kirkjuni í Kuba, kardinalurin Jaime Ortega, kom nýliga við óvanliga hvøssum atfinningum at stýrinum í Havanna*
Mynd: Reuters



*Raúl Castro hevur tikið við forsetaembætinum eftir bróðurin Fidel, men hvussu leingi situr hann í embætinum afturat?*
Mynd: AFP